# Favorittarnir greiddu setningin



*Hóast tær hjá Neistanum vórðu mettar sum greiðir favorittar, so megnaði VÍF allan dystin at bíta væl frá sær*
*Savnsmynd*

**Neistin hevði trupulleikar í Vestmanna, men saman við Stjørnuni og VB tykist liðið kortini hava beina kós móti ætlaða favoritt-leiklutinum**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Eftir at VB og Stjørnan í fjør fullkomuliga domineraðu hondbóltskappingina, hevur Neistin í ár ætlanir um at blanda seg út í tvídystin teirra millum.

Fleiri sterkir spælarar eru í summar komnar til felagið, og leygardagin skuldu tær so fyri fyrstu ferð royna seg í praksis, tá vitjað varð í Vestmanna.

Har hevur talan verið um hampuliga stóra frágongd í summar, og tí varð roknað við, at Neistin fór at vinna ein tryggan sigur. Talan gjørdist eisini um sigur, men hesin varð tó langt ífrá so tryggur, sum tær høvdu ætlað.

Fram til seinasta korterið av dystinum vóru tað tvørtur ímóti tær á heimaliðnum, sum vóru omaná, men við mansverju av Ioanu Rápa fekk Neistin kortini vent hóttandi tapinum.

## Greiðir sigrar

Í hinum báðum dystunum var ikki tað stóra ivamálið um, hvat betra liðið var.

Søljan hevði á heimavølli vitjan av VB, sum vann ikki minni enn 32-14, og í Klaksvík var á leið sama skilið, tá Stjørnan vann ein greiðan sigur á Kyndli.

Hvussu styrkislutfallið er millum liðini, ber illa til at siga eftir hesa fyrstu roynd-ina, men í so máta fæst eitt svar kanska longu komandi vikuskiftið. Tá fer Neistin til Vágs at royna seg, og tað er nógv, sum bendir á, at Neistin í hesum fær sína veruliga styrkisroynd. Ein roynd, sum kanska fer at avdúka, hvørt tað skulu verða tvey ella trý lið, sum í ár fara at stríðast í oddinum.

## Fakta um dystirnar

**VÍF-Neistin 25-28 (14-14)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 10(1), Fríða Marjunardóttir 8, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 6, Linda Johannesen 1
**Neistin:** Nicoleta Radu Hansen 10(1), Annika Ljósstein 7(1), Unn Kragesteen 4, Anna Clementsen 4, Ása á Neystabø 2, Mildrið Jacobsen 1
**Brotskøst:** VÍF 3, Neistin 3
**Útvísingar:** Neistin 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Stjørnan-Kyndi 32-17 (16-6)**
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Alina Olaru 11(2), Louisa Andreasen 6(1), Bára S. Klakstein 3, Joan M. Djordjevic 3, Una Olsen 2, Anna Kristina Samson 2, Maria við Neyst 2, Katarina Stepanov 2, Birita Hansen 1
**Kyndil:** Lina Andriulyte 5(1), Anja Heinadóttir 3, Súsanna Petersen 3, Hildur Mikkelsen 2, Randi S. Wardum 2, Linda Weihe 1, Jórun Kudvig 1
**Brotskøst:** Stjørnan 3, Kyndil 2
**Útvísingar:** Kyndil 3
**Dómarar:** Hartvig Joensen & Kári Hansen

## Máltindarnir

adidas

### Formula-deildin

| | | |
|---|---|---|
| Sorin Anghel | EB/S | 13 |
| Christian Høgni Jacobsen | NSÍ | 13 |
| Bogi Gregersen | Skála | 12 |
| Hans á Lag | HB | 11 |
| Allan Mørkøre | B36 | 10 |
| Sámal Joensen | GÍ | 10 |
| Jónhard Frederiksberg | Skála | 10 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Heðin á Lakjuni | KÍ | 9 |
| Dan Djurhuus | VB | 9 |
| Hans Pauli Samuelsen | EB/S | 8 |
| Tór-Ingar Akselsen | HB | 8 |
| Obele Okeke Onyebuchi | B36 | 7 |
| Rúni Nolsøe | HB | 7 |
| Óli Johannesen | TB | 7 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 6 |
| Rasmus Nolsøe | HB | 6 |
| Rókur F. Jespersen | HB | 6 |
| Hjalgrím Elttør | KÍ | 6 |
| Hanus Thorleifsson | Skála | 6 |
| Fróði Benjaminsen | B36 | 5 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jákup á Borg | HB | 5 |
| David Ahmed (Silla) | ÍF | 5 |
| Atli Danielsen | KÍ | 5 |
| Andy Olsen | NSÍ | 5 |
| Helgi L. Petersen | NSÍ | 5 |
| Páll M. Joensen | NSÍ | 5 |
| Milan Kulic | VB | 5 |

### 2. deild

| | | |
|---|---|---|
| Clayton Soares | B71 | 23 |
| Súni Fríði Barbá | AB | 17 |
| Jóhan Petur Poulsen | B68 | 13 |
| Magnus Olsen | B71 | 12 |
| Sonny Johansen | FSV04 | 12 |
| Birgir Joensen | FSV04 | 10 |
| Uni Arge | HB | 10 |
| Hendrik Rubeksen | HB | 8 |
| Magnus Skorðalíð | LÍF | 8 |
| Ovi Magnussen | B68 | 7 |
| Øssur Jacobsen | B68 | 7 |
| Tummas Pauli Olsen | B71 | 7 |
| Eli Hentze | B71 | 6 |
| Kim Poulsen | FSV04 | 6 |
| Fróði Joensen | LÍF | 6 |
| Tummas Hans Rubeksen | B36 | 5 |
| Arnbjørn Danielsen | B68 | 5 |
| Petur Sjúrðaberg | LÍF | 5 |
| Kenneth Kjærbo | Sumba | 5 |

### Formula-deildin

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 24 | 13 - 8 - 3 | 34 | 15 | 19 | 47 |
| 2 | HB | 24 | 14 - 4 - 6 | 62 | 31 | 31 | 46 |
| 3 | Skála | 23 | 12 - 9 - 2 | 49 | 24 | 25 | 45 |
| 4 | NSÍ | 23 | 11 - 7 - 5 | 42 | 33 | 9 | 40 |
| 5 | EB/ Streymur | 24 | 10 - 9 - 5 | 42 | 32 | 10 | 39 |
| 6 | ÍF | 24 | 6 - 7 -11 | 30 | 52 | -22 | 25 |
| 7 | KÍ | 24 | 7 - 3 -14 | 34 | 44 | -10 | 24 |
| 8 | GÍ | 24 | 6 - 4 -14 | 31 | 49 | -18 | 22 |
| 9 | VB | 24 | 5 - 5 -14 | 31 | 53 | -22 | 20 |
| 10 | TB | 24 | 4 - 6 -14 | 25 | 47 | -22 | 18 |

### 2. deild menn

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B71 | 15 | 12 - 2 - 1 | 60 | 9 | 51 | 38 |
| 2 | B68 | 15 | 12 - 2 - 1 | 55 | 12 | 43 | 38 |
| 3 | FSV04 | 15 | 10 - 1 - 4 | 44 | 16 | 28 | 31 |
| 4 | AB | 15 | 9 - 2 - 4 | 35 | 30 | 5 | 29 |
| 5 | HB | 15 | 7 - 1 - 7 | 38 | 34 | 4 | 22 |
| 6 | Sumba | 15 | 5 - 1 - 9 | 30 | 58 | -28 | 16 |
| 7 | LÍF | 15 | 4 - 3 - 8 | 40 | 41 | -1 | 15 |
| 8 | Royn | 15 | 4 - 2 - 9 | 18 | 48 | -30 | 14 |
| 9 | B36 | 15 | 3 - 3 - 9 | 16 | 38 | -22 | 12 |
| 10 | GÍ | 15 | 0 - 1 -14 | 14 | 64 | -50 | 1 |

### Sunset-kappingin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 32 | 14 | 18 | 2 |
| 2 | Stjørnan | 1 | 1 - 0 - 0 | 32 | 17 | 15 | 2 |
| 3 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 28 | 25 | 3 | 2 |
| 4 | StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | VÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 25 | 28 | -3 | 0 |
| 7 | Kyndil | 1 | 0 - 0 - 1 | 17 | 32 | -15 | 0 |
| 8 | Søljan | 1 | 0 - 0 - 1 | 14 | 32 | -18 | 0 |

### Atlantic Airways-kappingin

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 1 | 1 - 0 - 0 | 25 | 20 | 5 | 2 |
| 2 | VÍF | 1 | 1 - 0 - 0 | 31 | 29 | 2 | 2 |
| 3 | Kyndil | 1 | 0 - 1 - 0 | 29 | 29 | 0 | 1 |
| 4 | H71 | 1 | 0 - 1 - 0 | 29 | 29 | 0 | 1 |
| 5 | KÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 29 | 31 | -2 | 0 |
| 6 | StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 20 | 25 | -5 | 0 |